# Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 24.06.2022
Mál nr.: 21/24057
Málsviðgjørt: JAK

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| **§ 5. ...**<br>*Stk. 2.* Fráboðan um gjaldsteðg má ikki vera latin inn ímóti einum stovnara, og ein stovnari má ikki vera undir trotabúarviðgerð. | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 138 frá 6. oktober 2011 um lutaíbúðafeløg, verður § 5, stk. 2 orðað soleiðis:<br>“*Stk. 2.* Áheitan um endurskipan má ikki vera latin inn av ella ímóti einum stovnara, og ein stovnari má ikki vera undir trotabúsviðgerð.” |
| **§ 2. ...**<br>*Stk. 2.* ...<br>“Hevur fyritøkan boðað frá gjaldssteðgi, er fráboðanardagurin freistdagur, um fyritøkan vegna insolvens er hildin uppat áðrenn 3 vikur aftaná, at gjaldssteðgurin hevur mist gildi eftir § 16 í konkurslógini.” | **§ 2**<br><br>Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 25. mai 2009, verður § 2, stk. 2, 2. pkt. orðað soleiðis:<br>“Er fyritøkan undir endurskipanarviðgerð, er dagurin, tá skiftirætturin fekk áheitanina um endurskipanarviðgerð, freistdagur, um fyritøkan vegna insolvens er hildin uppat |

| | |
|---|---|
| | áðrenn 3 vikur aftaná, at endurskipanin hevur mist gildi eftir konkurslógini.” |
| **§ 10. ...**<br>1) ...<br>a)-c) ...<br>d) er undir konkursviðgerð ella samráðing er byrjað um tvangsakkord. | **§ 3**<br><br>Í løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður § 10, nr. 1, litra d orðað soleiðis:<br>“d) er undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð.” |
| **§ 7.** Vinningur ella tap við eftirgeving, fyrning, samanrenning, fyrilokan av skuld og orsakað av neyðskuldarsemju og sjálvbodnari skuldarsemju verða roknað við í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni eftir § 14 í tann mun, skuldin verður niðurskrivað niður um kursvirðið á kravinum fyri kravánaranum, tá skuldin varð eftirgivin v.m. | **§ 4**<br><br>Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 173 frá 21. desember 2021, verður í § 7, stk. 1 “neyðskuldarsemju” broytt til: “endurskipan”. |
| **§ 39.** Kommer Køberen efter Købets Afslutning under Konkurs eller aabnes der Forhandling om Tvangsakkord for ham, har Sælgeren, skønt der er givet Henstand med Betalingen, Ret til at holde Salgsgenstanden tilbage eller, hvis den er forsendt fra Leveringsstedet, at hindre dens Overgivelse til Boet, indtil betryggende Sikkerhed stilles for Købesummens Betaling til Forfaldstid... | **§ 5**<br><br>Í Lov nr. 102 af 6. april 1906 om Køb, sum broytt við anordning nr. 371 af 20. december 1961, anordning nr. 588 af 4. november 1982, anordning nr. 150 af 21. marts 1988, anordning nr. 184 af 15. marts 1989 og anordning nr. 398 af 20. april 2010, verður í § 39, stk. 1, 1. pkt. “eller aabnes der Forhandling om Tvangsakkord for ham” broytt til: “eller rekonstruktionsbehandling”. |
| **§ 37 ...**<br>Ligeledes kan han hindre Godsets Overgivelse, naar der aabnes Forhandling om **Tvangsakkord** for Kommittenten, eller naar dennes Formuesforhold i øvrigt viser sig at være saadanne, at han maa antages at være ude af Stand til ved Forfaldstid at betale en Fordring, for hvilken Kommissionæren vilde have haft Panteret i Godset, hvis det var forblevet i hans | **§ 6**<br><br>Í Lov nr. 243 af 8. maj 1917 om Kommission, Handelsagentur og Handelsrejsende, verður í § 37, stk. 1, 2. pkt. “Tvangsakkord” broytt til: “rekonstruktion”. |

| | |
|---|---|
| Besiddelse. Har Kommissionæren gjort Brug af den angivne Ret, kan han gøre sin Panteret gældende efter Reglerne i §§ 33 og 34. | |
| **§ 17.** Udstederen kan selv over for en Erhverver i god Tro paaberaabe sig,<br>at Gældsbrevet var falsk eller forfalsket, underskrevet paa hans Vegne uden Fuldmagt dertil eller ugyldigt paa Grund af voldelig Tvang (Lov Nr. 242 af 8. Maj 1917 om Aftaler og andre Retshandler paa Formuerettens Omraade § 28), umyndighed som følge af mindreårighed og tinglyst værgemål med fratagelse af den retlige handleevne, jf. værgemålslovens § 6, eller manglende evne til at handle fornuftsmæssigt, jf. værgemålslovens § 46,<br>at Gældsbrevet var erklæret dødt og magtesløst, eller at Fordringen var ophørt eller forandret efter Lovgivningens Regler om Deponering, Forældelse, Præklusion eller **Tvangsakkord** eller Gældssanering. | **§ 7**<br><br>Í Lov nr. 146 af 13. april 1938 om Gældsbreve, sum broytt við anordning nr. 371 af 20. december 1961, anordning nr. 588 af 4. november 1982, anordning nr. 150 af 21. marts 1988, anordning nr. 184 af 15. marts 1989 og anordning nr. 398 af 20. april 2010, verður í § 17 "Tvangsakkord" broytt til: "rekonstruktion". |
| | **§ 8**<br><br>Í Lov nr. 68 af 23. Marts 1932: Vekesellov, sum broytt við lov nr. 411 af 30. november 1965 og løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 283. ...**<br>1) ...<br>2) eftir at búgv hansara er tikið til trotabúsviðgerð, **ella eftir at tingingar um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang eru byrjaðar**, fremur gerðir, sum skulu forða fyri, at krøv og ognir í búnum koma kravánarum ella onkrum einstøkum av kravánarunum til góðar, ella<br>3) ... | **1.** Í § 283, stk. 1, nr. 2 verður "ella eftir at tingingar um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang eru byrjaðar" broytt til: "ella eftir at endurskipanarviðgerð er byrjað". |
| **§ 283. ...** | **2.** Í § 283, stk. 2 verður "gjaldssteðgur" broytt til: "endurskipanarviðgerð". |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Eru gerðir, sum nevndar í stk. 1, nr. 3, framdar fyri at geva kravánara framíhjárætt, verður hesin bert revsaður, um hann, tá tað var skilligt, at húsagangurin ella **gjaldssteðgur** hjá skuldaranum vóru fyri durum, fekk skuldaran til at geva sær framíhjáræ ttin. | |
| **§ 300. ...**<br>3)-4) ...<br>3) ið, sum skuldari ella álitisfólk gevur skeivar upplýsingar ella ger seg sekan í grovum gáloysni, tá ið hann letur inn **neyðugar váttanir til at byrja tingingar um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang**. | **3.** Í § 300, nr. 3 verður "neyðugar váttanir til at byrja tingingar um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang" broytt til: "neyðugar váttanir undir endurskipanarviðgerð" |
| **§ 304. ...**<br>*Stk. 2.* Á sama hátt verður tann revsaður, sum til atkvøðugreiðslu í sambandi við trotabúgv, skuldarfrágongubúgv ella undir **tingingum um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang** við falslæti ávirkar atkvøðugreiðsluna ella veitir, lovar ella bjóðar, tekur ímóti, krevur ella letur lova sær fíggjarligan fyrimun afturfyri at atkvøða fyri onkrum ávísum ella lata vera við at atkvøða. | **4.** Í § 304, stk. 2 verður "tingingum um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang" broytt til: "endurskipanarviðgerð". |
| **§ 28.** Kommer Forsikringstageren under Konkurs, **eller aabnes der Forhandling om Tvangsakkord udenfor Konkurs i hans Bo**, har dette, selv om andet er aftalt, ingen Virkning paa Forsikringsaftalen udover, hvad der følger af Lovgivningens almindelige Regler... | **§ 10**<br><br>Í løgtingslóg nr. 129 af 15. april 1930 um tryggingaravtalur, sum broytt við anordning nr. 460 af 9. september 1975, anordning nr. 150 af 21. marts 1988, lov nr. 50 af 24. februar 1960, lov nr. 179 af 24. maj 1972 og løgtingslóg nr. 33 frá 31. mars 2017, verður í § 28, 1. pkt. ", eller aabnes der Forhandling om Tvangsakkord udenfor Konkurs i hans Bo" broytt til: "eller rekonstruktionsbehandling". |
| | **§ 11**<br><br>Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum seinast broytt við |

| | |
|---|---|
| **§ 47 g.** Virkisveð, sbrt. § 47 d, ella kravsveð, sbrt. § 47 e, stovnað áðrenn avgerð um húsagang móti veðsetara er tikin, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir avgerðina.<br>*Stk. 2.* Virkisveð, sbrt. § 47 d, ella kravsveð, sbrt. § 47 e, stovnað áðrenn veðsetari hevur boðað frá gjaldsteðgi, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir fráboðanina.<br>*Stk. 3.* Virkisveð, sbrt. § 47 d, ella kravsveð, sbrt. § 47 e, stovnað áðrenn Skiftirætturin hevur tikið avgerð um at útseta trotabúsviðgerðina sbrt. § 24 í lovbekendtgørelse om konkurs, umfatar ikki ogn, ið er útvegað eftir avgerðina. Hetta er ikki galdandi, um veðsetarin, tá avgerðin um at útseta trotabúsviðgerðina verður tikin, er fevndur av ásetingunum í kap. 2 í lovbekendtgørelse om konkurs, ella um skuldarumskipanarmál er byrjað.<br>*Stk. 4.* Virkisveð, sbrt. § 47 d, ella kravsveð, sbrt. § 47 e, stovnað áðrenn Skiftirætturin hevur tikið avgerð um viðgerð av neyðskuldarasemju, umfatar ikki ogn, ið er útvegað eftir avgerðina. Hetta er ikki galdandi, um veðsetarin, tá samráðingar um neyðskuldarasemju (tvangsakkordforhandling) eru byrjaðar, er fevndur av ásetingunum í kap. 2 í lovbekendtgørelse om konkurs, ella um skuldarumskipanarmál er byrjað.<br>*Stk. 5.* Virkisveð, sbrt. § 47 d, ella kravsveð, sbrt. § 47 e, stovnað áðrenn Skiftirætturin hevur tikið avgerð um viðgerð av skuldarumskipanarmáli, umfatar ikki ogn, ið er útvegað eftir avgerðina. Hetta er ikki galdandi, um veðsetarin, tá avgerðin um at viðgera skuldarumskipanarmálið verður tikin, er fevndur av ásetingunum í kap. 2 í lovbekendtgørelse om konkurs, um búgv veðsetarans er komið undir trotabúsviðgerð, ella um samráðingar um neyðskuldarasemju eru byrjaðar. | løgtingslóg nr. 156 frá 10. desember 2021, verður § 47 g orðað soleiðis:<br><br>"**§ 47 g.** Virkisveð, sbr. § 47 d, ella kravsveð, sbr. § 47 e, stovnað áðrenn avgerð um húsagang móti veðsetara er tikin, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir avgerðina.<br>*Stk. 2.* Virkisveð, sbr. § 47 d, ella kravsveð, sbr. § 47 e, stovnað áðrenn skiftirætturin tók avgerð um at fara undir endurskipanarviðgerð, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir avgerðina. Hetta er ikki galdandi, um skuldarumskipanarmál er byrjað, tá avgerð verður tikin um at fara undir endurskipanarviðgerðina.<br>*Stk. 3.* Virkisveð, sbr. § 47 d, ella kravsveð, sbr. § 47 e, stovnað áðrenn, at skiftirætturin tók avgerð um at fara undir skuldarumskipanarmál, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir avgerðina. Hetta er ikki galdandi, um búgv veðsetarans, tá avgerðin verður tikin, er undir trotabúsviðgerð, ella endurskipanarviðgerð er byrjað." |
| | **§ 12** |

| | |
|---|---|
| **§ 10. ...**<br>*Stk. 2-3* ...<br>*Stk. 4*. Sjófólk kunnu krevja at verða loyst úr starvi, tá ið:<br>1) Reiðarin er farin á húsagang,<br>2) reiðarin doyr, og búgvið verður tikið til skiftiviðgerðar eftir 3. kap. í skiftilógini,<br>3) fyritøkan heldur uppat, og tað verður sannað, at reiðarin er ikki førur fyri at rinda kravið,<br>**4) reiðarin hevur boðað frá gjaldsteðgi, ella**<br>5) reiðari munandi hevur mishildið starvsavtaluna og sjófólkið ikki hevur rætt til at krevja seg loyst úr starvi eftir øðrum reglum í hesi lóg. | Í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um starvsviðurskifti o.a. hjá sjófólki, sum broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001, løgtingslóg nr. 32 frá 28. apríl 2009, løgtingslóg nr. 124 frá 22. desember 2010, løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, løgtingslóg nr. 133 frá 20. desember 2016, løgtingslóg nr. 51 frá 7. mai 2019 og løgtingslóg nr. 28 frá 11. mars 2022, verður § 10, stk. 4, nr. 4 orðað soleiðis:<br>“4) reiðarin er undir endurskipanarviðgerð, ella”. |
| **§ 40.** Landsstýrið kann taka eitt loyvi aftur<br>a) verða lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð brotin grovliga ella ferð eftir ferð,<br>b) verða í umsókn um loyvi givnar skeivar ella villeiðandi upplýsingar,<br>**c) boðar loyvishavarin frá gjaldssteðgi, biður um samráðingar um neyðskuldarsemju, fer á húsagang ella í likvidatión ella kemur í líka støðu.** | **§ 13**<br><br>Í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 26. mai 2010, løgtingslóg nr. 50 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 67 frá 29. mai 2017 og løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verður § 40, stk. 1, litra c orðað soleiðis:<br>“c) fer loyvishavarin undir endurskipanarviðgerð, á húsagang, í likvidatión ella kemur í líka støðu.” |
| **§ 22.** Loyvi eftir § 4 kann verða tikið aftur, um: | **§ 14**<br><br>Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012, løgtingslóg nr. 184 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verður § 22 orðað soleiðis:<br><br>“**§ 22.** Loyvi eftir § 4 kann verða tikið aftur, um: |

| | |
|---|---|
| 1) lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð verða brotin við vilja ella av grovum ósketni,<br>2) tað í umsókn um loyvi eru givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar,<br>3) loyvishavarin boðar frá gjaldsteðgi, letur inn umsókn um konkurs ella verður koyrdur konkurs.<br>*Stk. 2.* Um bøtt kann verða um eitt brot, sum nevnt í stk. 1, kann landsstýrismaðurin boða eigaranum frá, at hesin innan fyri eina nærri ásetta freist skal halda sínar skyldur eftir loyvinum.<br>*Stk. 3.* Verður loyvið tikið aftur eftir stk. 1 frá eini fyritøku við framleiðsluskyldu, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni. Fráboðar ein fyritøka við framleiðsluskyldu gjaldsteðg ella verður fyritøkan koyrd konkurs, uttan at loyvi verður tikið aftur, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni, um so er, at eftirlitið undir gjaldsteðginum, ella kurator annaðhvørt ikki ynskir at halda fram við loyviskravda virkseminum, ella at framleiðsluskylduga fyritøkan ikki heldur fram við framleiðsluskylduga virkseminum á nøktandi hátt. Eftirlitið ella kurator skal skjótast gjørligt og í seinasta lagi eina viku eftir gjaldsteðgin ella eftir konkursdekretið boða landsstýris-manninum frá, um framleiðsluskylduga virksemið heldur fram ella ikki. | 1) lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð verða brotin við vilja ella av grovum ósketni,<br>2) tað í umsókn um loyvi eru givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar,<br>3) loyvishavarin fer undir endurskipanarviðgerð, letur inn umsókn um konkurs ella verður koyrdur konkurs.<br>*Stk. 2.* Um bøtt kann verða um eitt brot, sum nevnt í stk. 1, kann landsstýrismaðurin boða eigaranum frá, at hesin innan fyri eina nærri ásetta freist skal halda sínar skyldur eftir loyvinum.<br>*Stk. 3.* Verður loyvið tikið aftur eftir stk. 1 frá eini fyritøku við framleiðsluskyldu, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni. Fer ein fyritøka við framleiðsluskyldu undir endurskipanarviðgerð, ella verður fyritøkan koyrd konkurs, uttan at loyvi verður tikið aftur, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni, um so er, at endurskipari ella kurator annaðhvørt ikki ynskja at halda fram við loyviskravda virkseminum, ella framleiðsluskylduga fyritøkan ikki heldur fram við framleiðsluskylduga virkseminum á nøktandi hátt. Endurskipari ella kurator skal skjótast gjørligt og í seinasta lagi eina viku eftir avgerð hjá skiftirættinum um endurskipanarviðgerð ella eftir konkursdekretið boða landsstýrismanninum frá, um framleiðsluskylduga virksemið heldur fram ella ikki.” |
| | **§ 15**<br><br>Í anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (Ársroknskaparlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 136 frá 11. desember 2013, løgtingslóg nr. 50 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2016 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar: |

| | |
|---|---|
| **§ 140.** For virksomheder, der er under betalingsstandsning efter konkursloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning, kan den færøske registreringsmyndighed tillade, at årsrapporten uanset fristen i § 138, stk. 1, 2. pkt., først indsendes, så den modtages hos registreringsmyndigheden senest 1 måned efter betalingsstandsningens ophør...<br>*Stk. 2-3.* ... | **1.** § 140, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:<br>“Skráseting Føroya kann hóast freistina í § 138, stk. 1, 2. pkt. loyva, at ársroknskapurin hjá einari fyritøku, sum er undir endurskipanarviðgerð, verður at lata inn soleiðis, at Skráseting Føroya móttekur hann í seinasta lagi 1 mánað eftir, at endurskipanarviðgerðin er endað.” |
| **§140. ...**<br>*Stk. 2.* ...<br>*Stk. 3.* For virksomheder, for hvilke der er indledt akkordforhandlinger i henhold til konkursloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning, finder stk. 1 og 2 tilsvarende anvendelse. Årsrapporten skal indsendes, så den er modtaget hos registreringsmyndigheden senest 1 måned efter akkordens stadfæstelse. | **2.** § 140, stk. 3 verður strikað. |
| | **§ 16**<br><br>Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 137 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 65 frá 30. apríl 2018, løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 43 frá 22. apríl 2021 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 49. ...**<br>*Stk. 2.* ...<br>*Stk. 3.* Nevndar- ella stjórnarlimir skulu lúka hesar treytirnar:<br>1) Nevndar- ella stjórnarlimi má ikki verða áløgd revsiábyrgd fyri brot á revsilógina, løgtingslóg um tryggingarvirksemi ella aðra viðkomandi lóggávu, um brotið hevur við sær vanda fyri, at viðkomandi ikki | **1.** § 49, stk. 3, nr. 2 verður orðað soleiðis:<br>“2) Nevndarlimur ella stjórnarlimur má ikki hava latið inn áheitan um ella vera undir endurskipanarviðgerð, konkurs ella skuldarumskipan.” |

| | |
|---|---|
| kann røkja starvið ella uppgávuna á trygdargóðan hátt.<br>**2) Nevndar- ella stjórnarlimur má ikki hava fráboðað gjaldsteðg, hava latið inn umsókn um neyðskuldarsemju, konkurs ella skuldarumskipan ella vera farin í gjaldsteðg, undir konkursviðgerð, skuldarumskipan ella neyðskuldarsemju.**<br>3)-4) ...<br>*Stk. 4-6.* ... | |
| *Gjaldsteðgur*<br><br>**§ 145.** Tryggingareftirlitið kann fráboða gjaldsteðg fyri tryggingarfeløg, tá fyrilit fyri áhugamálunum hjá íleggjarum ella tryggingartakarum tala fyri tí.<br>*Stk. 2.* Fráboðan um gjaldsteðg sambært stk. 1 verður fylgd av uppskoti Tryggingareftirlitsins um, hvør skal tilnevnast at hava eftirlit undir gjaldsteðginum, umframt eina váttan frá teimum avvarðandi um, at hesi játta og lúka treytirnar í § 238 í konkurslógini.<br>*Stk. 3.* Tryggingarfelagið kann ikki taka aftur eina fráboðan um gjaldsteðg uttan samtykki Tryggingareftirlitsins. | **2.** Yvirskriftin yvir § 145 og § 145 verða orðað soleiðis:<br><br>"*Endurskipanarviðgerð*<br><br>**§ 145.** Tryggingareftirlitið kann lata inn áheitan um endurskipanarviðgerð fyri tryggingarfeløg, tá fyrilit fyri áhugamálunum hjá íleggjarum ella tryggingartakarum tala fyri tí.<br>*Stk. 2.* Áheitan um endurskipanarviðgerð sambært stk. 1 verður fylgd av uppskoti Tryggingareftirlitsins um, hvør skal tilnevnast sum endurskipari og álitispersónur undir við endurskipanarviðgerðini, umframt eina váttan frá teimum viðkomandi um, at hesi játta og lúka treytirnar í § 238 í konkurslógini." |
| *Neyðskuldarsemja*<br><br>**§ 146.** Reglurnar í konkurslógini um neyðskuldarsemju verða við loyvi Tryggingareftirlitsins at nýta á tryggingarfeløg, tó undantikið lívstryggingarfeløg. Fyri neyðskuldarsemju av endurtryggingarfeløgum kemur loyvi Tryggingareftirlitsins í staðin fyri undirtøkufráboðanir nevndar í § 166, stk. 1, nr. 2, í konkurslógini. Frammanundan skal Tryggingareftirlitið síggja til, at endurtryggingarfelagið hevur vent sær til | **3.** Yvirskriftin yvir § 146 verður strikað, og §§ 146 og 147 verða orðaðar soleiðis:<br><br>"**§ 146.** Reglurnar í konkurslógini um endurskipanarviðgerð verða við loyvi Tryggingareftirlitsins at nýta á tryggingarfeløg, tó undantikið lívstryggingarfeløg.<br>*Stk. 2.* Í sambandi við støðuyvirlitið, ið skal sendast saman við endurskipanaruppskotinum, sbr. § 13, stk. 1, nr. 2 í konkurslógini, kann skiftirætturin, tá tað snýr seg um endurskipan av |

| | |
|---|---|
| allar kendar kravánarar um byrjan av samráðingunum viðvíkjandi neyðskuldarsemju, og at í minsta lagi 40 prosent av givnu afturboðanunum taka undir við, at farið verður undir slíkar samráðingar.<br>*Stk. 2.* Í sambandi við støðuyvirlitið, ið skal gerast, tá samráðingar um neyðskuldarsemju byrja, sbrt. § 165 í konkurslógini, kann skiftirætturin, tá tað snýr seg um neyðskuldarsemju av endurtryggingarfeløgum, eftir ummæli Tryggingareftirlitsins tilnevna ein óheftan tryggingarfrøðing til at gera eina uppgerð yvir virðið av krøvunum, ið eru fráboðað.<br>*Stk. 3.* Tá tað snýr seg um neyðskuldarsemju av endurtryggingarfeløgum, verða krøvini gjørd upp sambært § 176 í konkurslógini um viðtøku av eini neyðskuldarsemju, sammett við tey møttu og fráboðaðu krøvini.<br><br>**§ 147.** Reglurnar í hesi lóg um heimildir hjá landsstýrismanninum og Tryggingareftirlitinum og skyldur hjá tryggingarfeløgum mótvegis landsstýrismaninum og Tryggingareftirlitinum verða, við neyðugum tillagingum, at nýta fyri tær fyritøkur, ið hava steðgað gjaldingunum ella eru farnar í avtøku. | endurtryggingarfeløgum, eftir ummæli Tryggingareftirlitsins tilnevna ein óheftan tryggingarfrøðing til at gera eina uppgerð yvir virðið av krøvunum, ið eru fráboðað.<br><br>**§ 147.** Reglurnar í hesi løgtingslóg um heimildir hjá landsstýrismanninum og Tryggingareftirlitinum og skyldur hjá tryggingarfeløgum mótvegis landsstýrismaninum og Tryggingareftirlitinum verða, við neyðugum tillagingum, at nýta fyri tær fyritøkur, ið eru undir endurskipanarviðgerð ella eru farnar í avtøku.” |
| | **§ 17**<br><br>Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 2012, løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 51 frá 4. mai 2021 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 3.** [2)] Skráseting Føroya kann góðkenna ein persón sum løggildan grannskoðara, um viðkomandi | **1.** § 3, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis:<br>“3) ikki er undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð,”. |

| | |
|---|---|
| 1) hevur bústað í Føroyum, ella er fevndur av reglunum í Hoyvíkssáttmálanum um niðurseturætt og tænastuveitingar,<br>2) er myndugur og ikki undir verju,<br>**3) ikki hevur boðað frá gjaldsteðgi ella er er undir trotabúaviðgerð**<br>4) hevur staðið eina serliga próvtøku, sbrt. reglum givnar sambært § 31,...<br>5)-6) …<br>*Stk. 2-6.* ... | |
| | **2.** Aftan á § 3, stk. 1, nr. 3 verður sum nýtt nr. sett:<br>“4) ikki er álagdur trotabúsbann ella innan fyri tvey tey seinastu árini hevur verið álagdur trotabúsbann,”.<br>Nr. 4-6 verða eftir hetta nr. 5-7. |
| | **3.** Aftan á § 8 a, men áðrenn yvirskriftina yvir § 9, verður sett:<br><br>*“Trotabúsbann sambært konkurslógini*<br><br>**§ 8 b.** Grannskoðari, ið er álagdur trotabúsbann eftir konkurslógini, kann ikki geva grannskoðanarátekningar og váttanir eftir løgtingslógarinnar § 1, stk. 2 í 5 ár frá tí, at hann er álagdur trotabúsbann.” |
| *Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um útinningina av grannskoðanarvirksemi í ymiskum virkisformum, heruppií reglur um navn virkisins, húsagang og **neyðskuldarsemju** v.m., um útinnan av atkvøðurættinum í grannskoðanarvirkinum og avhendan av atkvøðurætti í sambandi við deyða, ella um góðkenningin verður latin í varðveitslu. | **4.** Í § 13, stk. 6 verður “neyðskuldarsemju” broytt til: “endurskipanarviðgerð”. |
| **§ 18. ...**<br>*Stk. 2-5.* ... | **§ 18**<br><br>Í løgtingslóg nr. 74 frá 25. mai 2009 um elektroniska undirskrift verður § 19, stk. 6, nr. 3 orðað soleiðis: |

| | |
|---|---|
| *Stk. 6.* Fjarskiftiseftirlitið kann taka rættin frá lyklamiðstøð at nýta heitið skikkað prógv, sbr. § 5, um lyklamiðstøðin,<br>1) hóast boð um tvingsilsbøtur ikki fylgir boðum frá Fjarskiftiseftirlitinum eftir stk. 2, § 20, stk. 1 ella § 21,<br>2) grovt ella í afturvendandi førum hevur brotið lógina ella ásetingar við heimild í hesi lóg ella<br>**3) boðar frá gjaldsteðgi ella fer á húsagang.** | "3) fer undir endurskipanarviðgerð ella fer á húsagang." |
| | **§ 19**<br><br>Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 24. ...**<br>*Stk. 2.* Fráboðan um gjaldsteðg má ikki vera latin inn ímóti einum stovnara, og ein stovnari má ikki vera undir trotabúarviðgerð.<br>*Stk. 3-4.* ... | **1.** § 24, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Stovnari má ikki vera undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð." |
| **§ 37.** Metingarfrágreiðingin skal gerast av einum ella fleiri serkønum metingarfólkum, ið eru óheft. Stovnararnir kunnu tilnevna góðkendar grannskoðarar ella fólk, ið Domstolsstyrelsen hevur tilnevnt sum yrkisserkøn álitisfólk í sambandi við samráðingar um neyðskuldarsemju. Skiftirætturin kann í øðrum førum tilnevna metingarfólk.<br>*Stk. 2-3.* ... | **2.** Í § 37, stk. 1, 2. pkt. verður "ella fólk, ið Domstolsstyrelsen hevur tilnevnt sum yrkisserkøn álitisfólk í sambandi við samráðingar um neyðskuldarsemju" strikað. |
| **§ 232. ...**<br>*Stk. 2.* Er fráboðan eftir stk. 1 ikki móttikin í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at Skráseting Føroya hevur biðið skiftirættin um at tvingsilsavtaka felagið, ella hevur felagið seinastu 5 árini verið undir tvingsilsavtøku, kann uppafturtøka ikki fara fram.<br>*Stk. 3-5.* ... | **3.** Í § 232, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:<br>"Freistin upp á 3 mánaðir verður frestað, um felagið verður tikið undir endurskipanarviðgerð." |

| | |
|---|---|
| *Skifti til trotabúarviðgerð* | **4.** Yvirskriftin yvir § 233 verður orðað soleiðis:<br><br>“*Skifti til endurskipan ella trotabúarviðgerð*” |
| **§ 233.** Áheitan um **trotabúarviðgerð** vegna felagið kann bert verða givin av høvuðsleiðsluni ella, um felagið er undir likvidatión, av likvidator.<br>*Stk. 2.* Koma likvidatorarnir til ta niðurstøðu, at likvidatiónin ikki fer at geva nóg mikið av fulnaði til kreditorarnar, skulu likvidatorarnir lata inn áheitan um **trotabúarviðgerð**.<br>*Stk. 3.* Er eitt felag undir tvingsilsavtøku eftir § 226, verður áheitanin um **trotabúarviðgerð** latin inn av likvidator. Er likviditator ikki tilnevndur, skal skiftirætturin av egnum ávum taka avgerð um **trotabúarviðgerð**.<br>*Stk. 4.* Tá áheitan um **trotabúarviðgerð** er latin inn, kunnu ikki fremjast skrásetingar viðvíkjandi kapitalfelagnum, tó burtursæð frá broytingum viðvíkjandi møguligum vali av grannskoðara.<br>*Stk. 5.* [1)] Eitt kapitalfelag, sum er undir **trotabúarviðgerð**, kann luttaka í samanleggingum sum tað uppathaldandi felagið, og kann luttaka í kloyvingum sum innskjótandi felagið, um kurator góðtekur tað. | **5.** Í § 233, stk. 1 og 2, tvær staðni í stk. 3, og í stk. 4 og 5 verður “trotabúarviðgerð” broytt til: “endurskipanarviðgerð ella trotabúarviðgerð”. |
| | **6.** Í § 233 verður sum stk. 6 sett:<br>“*Stk. 6.* Í einum felagi, har endurskiparin hevur yvirtikið leiðsluna av felagnum, kunnu ikki fremjast skrásetingar viðvíkjandi felagnum, tó burtursæð frá broytingum viðvíkjandi møguligum grannskoðara, sum endurskipari hevur tilnevnt, ella broytingar, ið eru samtyktar av aðalfundinum, og sum endurskipari hevur givið samtykki til.” |
| | |

| | |
|---|---|
| **§ 234.** Eitt felag, ið er undir trotabúarviðgerð, skal varðveita navn sítt við ískoytinum "undir trotabúarviðgerð". Í aðrar mátar verður § 228, stk. 1 at nýta. Tá trotabúarviðgerðin endar, verður tað skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya uttan so, at annað er ávíst í fráboðan skiftirætsins um hetta. | **7.** § 234 verður orðað soleiðis:<br>"**§ 234.** Eitt felag, ið er undir trotabúarviðgerð, skal varðveita navn sítt við ískoytinum: undir trotabúarviðgerð. Í aðrar mátar verður § 228, stk. 1 at nýta. Tá trotabúarviðgerð endar, verður tað skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya uttan so, at annað er ávíst í fráboðan skiftiræattarins um hetta.<br>*Stk. 2.* Eitt felag, ið er undir endurskipanarviðgerð, skal varðveita navn sítt við ískoytinum: undir endurskipanarviðgerð." |
| **§ 25. ...**<br>1)-2) ...<br>3) ikki er farin í gjaldsteðg,<br>4)-10) ...<br>*Stk. 3-8.* ... | **§ 20**<br><br>Í løgtingslóg nr. 136 frá 6. oktober 2011 um keyp og sølu av fastogn o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 53 frá 30. apríl 2018, verður § 25, stk. 2, nr. 3 orðað soleiðis:<br>"3) ikki er undir endurskipanarviðgerð,". |
| **§ 9.** Umhvørvisstovan góðkennir eftir umsókn fysiskan ella løgfrøðiligan persón sum installatørur av hitapumpuskipanum og/ella sum brunnborara. Fyri at fáa góðkenning skal umsøkjarin:<br>1) ikki hava boðað frá gjaldsteðgi ella vera undir trotabúsviðgerð,<br>2)-3) ...<br>*Stk. 2-5.* ... | **§ 21**<br><br>Í løgtingslóg nr. 22 frá 16. mars 2012 um el riknar hitapumpuskipanir, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 29. mai 2017, verður § 9, stk. 1, nr. 1 orðað soleiðis:<br>"1) ikki vera undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð,". |
| **§ 5. ...**<br>1) ...<br>2) Nevndar- ella stjórnarlimur má ikki hava fráboðað gjaldsteðg, hava latið inn umsókn um neyðskuldarsemju, konkurs ella skuldarumskipan ella vera farin í gjaldsteðg, undir konkursviðgerð, skuldarumskipan ella neyðskuldarsemju. | **§ 22**<br><br>Í løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 5, stk. 3, nr. 2 orðað soleiðis:<br>"2) Nevndarlimur ella stjórnarlimur má ikki hava latið inn áheitan um endurskipanarviðgerð, umsókn um konkurs ella skuldarumskipan ella vera undir endurskipanarviðgerð, konkursviðgerð ella skuldarumskipan." |

| | |
|---|---|
| 3) ... | |
| **§ 46. ...**<br>*Stk. 2.* Skráseting Føroya skal lata vera við at skráseta eftir stk. 1, um ein limur í evstu leiðsluni ella dagligu leiðsluni í eini fyritøku ella persónurin eru dømd fyri revsiverd viðurskifti, ið hava við sær ein grundaðan váða fyri misnýtslu av starvinum ella uppgávuni, sambært § 78, stk. 2 í revsilógini, ella hava latið inn áheitan um konkurs ella skuldarumskipan ella eru undir konkursviðgerð ella skuldarumskipan.<br>*Stk. 3-7.* ... | **§ 23**<br><br>Í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður § 46, stk. 2 orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Skráseting Føroya skal lata vera við at skráseta eftir stk. 1, um ein limur í evstu leiðsluni ella dagligu leiðsluni í eini fyritøku ella persónurin er dømdur fyri revsiverd viðurskifti, ið hava við sær ein grundaðan váða fyri misnýtslu av starvinum ella uppgávuni, sambært § 78, stk. 2 í revsilógini, ella hevur latið inn áheitan um endurskipanarviðgerð, konkurs ella skuldarumskipan ella er undir endurskipanarviðgerð, konkursviðgerð ella skuldarumskipan." |